Dagf. 29. apríl 2024
HMR j. nr. 24/09857-4

Margit Stóra
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-114/2023 eftir § 52 a í tingskipanini um trivnaðarkanningar í Sjúkrahúsverkinum, frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu nógvir pengar eru settir av til komandi trivnaðarkanning í sjúkrahúsverkinum?
2. Um ikki ber til at svara neyvt, ber so til at koma við einum boði til nærmastu 100.000 kr. ella nærmastu 500.000 kr.?
3. Hví verður tað mett neyðugt at gera trivnaðarkanning aftur nú, tá kanningar hava verið gjørdar í bæði í november 2022 og í oktober 2023?
4. Hvørji ítøkilig átøk eru framd eftir kanningina í 2022?
5. Hvørji ítøkilig átøk eru framd eftir kanningina í 2023?

Svar:

Til spurning 1
Sambært Sjúkrahúsverkinum er peningur ikki settur ítøkiliga av til trivnaðarkanningina. Útreiðslurnar verða ein partur av rakstrarútreiðslunum hjá Sjúkrahúsverkinum. Í løtuni er trivnaðarkanningin í útboði, og tí er enn ikki greitt, hvat kostnaðurin kemur at vera.

Til spurning 2
Sjúkrahúsverkið hevur upplýst, at kostnaðurin í 2022 var 204.400 kr. og fevndi um øll trý sjúkrahúsini. Ein minni uppfylgjandi kanning í 2023 kostaði 63.000 kr. og fevndi somuleiðis um øll trý sjúkrahúsini.

Til spurning 3
Trivnaður og gott arbeiðsumhvørvi er av stórum týdningi hjá starvsfólkunum í Sjúkrahúsverkinum. Tí leggur Sjúkrahúsverkið dent á, at gera hetta sjónligt fyri leiðsluna og starvsfólkini á einstøku deildunum.

Tað eru nógvar deildir í Sjúkrahúsverkinum, og torført er at síggja og meta um trivnaðin á øllum deildum, um tað ikki verður nýtt nakað amboð til endamálið. Tað er umráðandi fyri sjúkrahúsleiðsluna at vita, hvønn veg tað ber, og hvar tað er neyðugt at seta fleiri átøk í verk.

Sum partur av visjón 2025 hevur sjúkrahúsleiðslan gjørt av, at trivnaðarkanningar skulu gerast árliga. Hetta fyri at stuðla arbeiðnum hjá sjúkrahúsunum, tá tað snýr seg um trivnað og virðisgrundarlag.

Sambært Sjúkrahúsverkinum var trivnaðarkanningin í 2022 ein umfatandi kanning, sum innihelt millum 30-40 spurningar. Kanningin í 2023 var ein minni, uppfylgjandi kanning við 10 spurningum, fyri at kunna meta um, um kanningin í 2022 og tey átøk, ið vóru sett í verk, hava gjørt mun.

Kanningin í ár verður aftur ein umfatandi kanning, og ynskir sjúkrahúsleiðslan við hesum áhaldandi at leggja dent á trivnaðin hjá starvsfólkunum í Sjúkrahúsverkinum. Hetta fyri m.a. at tryggja fasthaldan og rekruttering av nýggjum starvsfólkum. Sambært Sjúkrahúsverkinum er góður trivnaður eisini liður í, at tey flyta seg fram móti visjón 2025 við einum sameindum Sjúkrahúsverki á altjóða støði, eyðkent fyri nýhugsan og harafturat stuðla undir missiónina at veita eina dygdargóða heilsutænastu alt lívið.

Til spurning 4
Síðani kanningina í 2022 eru fleiri ítøkilig átøk framd. Sambært Sjúkrahúsverkinum eru hesi átøk ymisk í mun til hvørja deild talan er um. Nøkur átøk, ið ganga aftur, eru samstarv, samskifti, sjónlig leiðsla, fundarstrukturur, betri skipaðar mannagongdir og sosial tiltøk.

Til spurning 5
Kanningin í 2023 legði dent á trý útvald øki, sum vóru “motivatión”, “nærmasti leiðari” og “okkara virðisgrundarlag”.
Úrslitini frá kanningini vístu, at tað er framgongd á næstan øllum økjum.
Deildirnar hava síðani arbeitt hvør sær við átøkunum, sum tey settu í verk í 2022, og summar hava eisini sett nýggj átøk í verk.

At arbeiða við trivnaði hjá starvsfólki er ein støðug tilgongd og er tí nakað, sum áhaldandi mennist og veksur. Sambært Sjúkrahúsverkinum eru tí fleiri av átøkunum, sum vórðu sett í verk í 2022, eisini galdandi fyri 2023 og frameftir.

Heilsumálaráðið, 29. apríl 2024

Margit Stóra
landsstýriskvinna